gult32 cyan32 magenta32 svart32



# Góðar sponsorsáttmálar



*Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, og stjórin í Føroya Banka, Janus Petersesn, taka lógvatak eftir at hava undirskrivað nýggja tvey-ára sponsorsáttmálan*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sponsorsáttmálarnir hjá teimum fýra stóru stuðlunum hjá HB vórðu undirskrivaðir undan dystinum móti B68 sunnudagin**

SPONSORSÁTTMÁLAR
*Jákup Mørk*

HB skipaði fyri einum heldur forvitnisligum tiltaki undan fyrsta dystinum í bestu mansdeildini sunnudagin. Undan dystinum móti B68 hevði felagið boðið stuðlum, fjølmiðlum og viðhaldsfólkum á tíðindafund, har okkurt ábitið eisini var at fáa.

Fyrst og fremst varð hetta gjørt, tí sponsorsáttmálarnir hjá HB formliga vórðu undirskrivaðir hendan dagin. Ikki tí, avtalurnar eru fyri langari tíð síðani fingnar upp á pláss, men hetta varð mett sum eitt hóskandi høvi at skriva undir, eins og umboð fyri sponsorarnir eisini fingu høvi at siga nøkur orð. Stuðlarnir, sum HB skrivaði sáttmála við, vóru Føroyabanki (høvuðsstuðul), Føroya Shell, Eimskip (ungdómsstuðul), og Thomas Dam ítróttur, sum er klædnastuðul. Ikki minst var tað áhugavert at hoyra Janus Petersen, stjóra í Føroya Banka, greiða frá, hvønn týdning tað hevur fyri vinnulívið at nýta ítróttin sum miðil at røkka viðskiftafólkum. Ofta verður annars tikið til, at slíkar avtalur einamest eru ítróttafeløgunum at gagni, men einki er tó at ivast í, at sponsorarnir eisini fáa nakað burtur úr. Eisini hóast hetta ikki altíð kann mátast í krónum og oyrum.

Umframt undirskrivanina av avtalunum, fingu áhoyrarrnir eisini nakað at vita um, hvussu HB liðið fór at verða samansett í ár. Venjarin hjá besta mansliðnum, Ion Geolgau, greiddi frá uppstilling og spæliætlan til frammanfyristandandi dystin, og harumframt tosaði hann eisini nakað um, hvørjar aðrar leikarar fólk kundu rokna við at síggja á vøllinum í ár. Eftir hetta var eisini høvi at seta Ion spurningar um liðið, so alt í alt vóru áhoyrararnir betri kunnaðir enn vanligt, tá farið varð at hyggja at sjálvum dystinum, sum tá saman um kom fekk eitt – fyri HB – positivt útfall.

Alt í alt varð talan sostatt um ein góðan sunnudag hjá HB. Trý stig í stigaposan og sponsorkrónur í pengakassan.

3. deild:

# Tað sum vendir niður vendir upp

**KÍ og TB eru á odda, meðan sandoyingar eru saman við GÍ í botninum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Ætlanin er aftur í ár at fylgja eitt sindur við í 3. deild. Tað verður fyrst og fremst gjørt við hagtølunum, meðan orðavavsturin ikki verður tann sami, sum hann hevur verið í fleiri ár.

Hesa ferð skulu vit bara staðfesta, at KÍ, sum plagar at tapa heilt nógv í nógvum teimum fyrstu umførunum, og sum ikki plagar at bjarga sær sessinum í deildini fyrrenn fram ímóti endanum á kappingini, fekk eina rúkandi byrjan. Teir vunnu ikki minni enn 7–1 á GÍ. Á manningarlistanum hjá KÍ sæst, at talan er um sera gott fólk til 3. deild. Nú fáa vit at síggja, hvussu tað fer at roynast. Ofta hevur tað víst seg í stóru feløgunum, at tað ikki er sama fólkið á heimavølli og á útivølli.

Signar Johannesen er uppvaksin á Toftum, har hann hevur spælt nógv við B68. Nú býr hann í høvuðsstaðnum og spælir fótbólt við AB. Hann skoraði tvey av málunum ímóti barndómsfelagnum, meðan fyrrverandi NSÍ maðurin Johnny Skibenæs skoraði tað síðsta. Málið hjá B68 skoraði Aksel Petersen. Hann er sonur fyrrverandi B68 álopsmannin Jógvan Petersen, sum í 1990 varð skrásettur fyri ein landsdyst. Tað var tá Føroyar og Canada spældu í Klaksvík og Canada vann 1–0.

Á Sandi vendi tað eisini skeiva vegin, um tað ber til at siga tað soleiðis. B71 hevur seinnu árini verið við í toppstríðnum, meðan tað ofta hevur gingið heilt illa hjá TB. Hesa ferð vunnu tvørámenn sannførandi. Merkisvert er tað, at bæði André Dalfoss og Teitur Rasmussen undanfarin ár hava spælt við besta TB liðnum.

Tveir dystir vóru í Suðuroy. Í Hvalba var heimaliðið, sum í ár hevur Eyðun Gullok Svalbard sum ábyrgdarmann, frammanfyri 2–0 í steðginum, og nógv bendi á tryggar heimasigur, tí Royn hevði spælið og fleiri góðar møguleikar. B36 var illa mannað. Í ferðalagnum vóru tveir málverjar og níggju útispælarar, men millum teirra var Tummas Eli Hansen. Í 2. hálvleiki legði fyrrverandi landsliðsmaðurin upp til eitt mál, og so skoraði hann eitt, og harvið fóru B36 úr Hvalba við einum stigi.

Í Vági var munurin ímillum VB og ÍF fyrst og fremst Birgir Jørgensen. Hann ger ikki so nógv við fótbóltsvenjingina nú, sum hann onkuntíð hevur gjørt. Men máltevið er framvegis har. Hann gjørdi reint hattrikk, og tá hann í 87. minutti staðfesti stóra heimasigurin sendi hann seg sjálvan upp á ovastu rók á máltindinum.

### 1. umfar

KÍ–GÍ 7–1 (1–0)
1–0: Sørin Petersen
2–0: Erling Fles
2–1: Jan Jacobsen
3–1: Helmar Lassen
4–1: Eyðun Klakstein
5–1: Sørin Petersen
6–1: Helmar Lassen
7–1: Andeas Josephsen

AB–B68 3–1 (3–1)
1–0: Johnny Skibenæs 5
1–1: Aksel Petersen 14
2–1: Signar Johannesen 16
3–1: Signar Johannesen 27

B71–TB 0–4 (0–2)
0–1: Birgir Rasmussen 2.
0–2: André Dalfoss br 34
0–3: Teitur Rasmussen 70.
0–4: André Dalfoss 85.

Royn–B36 2–2 (2–0)
1–0: Allan Michelsen
2–0: Jóhannes Johannesen
2–1: Petur Martin Johansen
2–2: Tummas Eli Hansen

VB–ÍF 6–3 (2–2)
1–0: Tummas Richard 19.
1–1: Hjalti Lundsbjerg 23.
1–2: Henry Petersen 24.
2–2: Birgir Jørgensen 40.
3–2: Birgir Jørgensen 65.
4–2: Birgir Jørgensen 71.
5–2: Petur Óli Samuelsen 76.
5–3: Njálur R. Petersen 82.
6–3: Birgir Jørgensen 87.

gult33 cyan33 magenta33 svart33




## Framleiðslutól til fiskavirking til sølu

Um hóskandi boð fæst, verða framleiðslutólini hjá SP/F Fagralíð við hesum lýst til sølu.

Virkið hevur rikið fiskaframleiðslu, og hevði í ár 2000 eina umsetning uppá uml. 35 mió.

Talan er um m.a. um hesa útgerð:

Scania Lastbilur, rúmar 16 plattar,
gaffiltruckur og lyftivognur,
skeriborð til 10 fólk,
sorterings- og vektarskipan,
etikettuprintari og bandmaskina,
slógvkvørn,
kantinu- og skrivstovuinnbúgv,
kassar og kør.

Virkið heldur til í leigaðum hølum á Vestaru Bryggju, Tórshavn, og møguleiki er at yvirtaka leigusáttmálan eftir nærri avtalu við Tórshavnar Havn.

Virkið er løggilt eftir matvørulógini, eins og innvigingarskipanin er góðkend eftir reglunum í fiskiveiðulógini. Viðmerkjast skal tó, at tann, sum keypir framleiðslutólini við atliti uppá framhaldandi fiskaframleiðslu, sjálvur má taka hesi viðurskifti upp við avvarðandi myndugleikar.

Framleiðslutólini verða sýnd fram eftir nærri avtalu.

**Annfinn V. Hansen**
**Advokatfirma**
Gongin, postrúm 106
FO 110 Tórshavn
Tel. 319595 · Fax 315499

Røktar- og umlættingarheimið
Lágargarður

## Fysioterapeutur

Starvið sum fysioterapeutur á Lágargarði er leyst at søkja og kann setast sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Lønarbrøkurin er 0,7 og starvið er lønt sambært galdandi sáttmála.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja á tlf. 316788.

Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmæli skulu sendast leiðaranum á Lágargarði, Stoffalág 84, Box 1188, 110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er til mánadagin 21. mai 2001.

## Føroya Studentaskúli og HF-skeið

**Hoydalar**
**FO-188 Hoyvík**
Tlf. +298 312973 · Telefax +298 318624

Frá 1. aug. 2001 er eitt fast starv leyst at søkja í lærugreinini

**føroyskum**

Umsøkjarar verða bidnir um at upplýsa, hvørjari aðrari lærugrein teir hava undirvísingarførleika í.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum YF (Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara) og Føroya Landsstýri.

Umsókn á oyðublaði frá YF verður stílað til Mentamálastýrið, Tórshavn, men verður sent rektaranum: **Mads A. Winther, Føroya Studentaskúli og HF-skeið, Hoydalar, FO-188 Hoyvík.**

Avrit av prógvum ella úrskrift av próvtøkubók skal hjáleggjast.

Umsóknir skulu vera rektaranum í hend í seinasta lagi 8. mai 2001.

## Ekspeditrisa

Til handilin við Landavegin verður søkt eftir tilkomnari kvinnu til skiftandi vaktir.

BAKARÍIÐ
HJÁ GUNLEIVI
Ring 22 51 60 ella 31 21 61

## Planta eitt træ

Klaksvíkar Býráð vil aftur í ár bjóða nøkur trø at planta í urtagarðarnar.

Tey, sum ynskja at fáa ein plantupakka frá Klaksvíkar Býráð, verða biðin um at koma á brandstøðina leygardagin 5. mai millum klokkan 1500 —1800 til at fáa ein útflýggingarseðil.

Bert ein pakki er til hvørt húski og mongdin er avmarkað.

Í plantupakkanum eru fimm trø. Planturnar eru frá Skógrøkt Landsins og eru hetta trø av allarbestu góðsku og vælegnaði til føroyska veðurlagið.

Trøini verða at fáa á brandstøðini týsdagin 8. mai millum 1500 — 1800

**Klaksvíkar Býráð**

## Málarar

Søkt verður eftir málarum at arbeiða í Danmark. Góð løn.

**Tlf. 0045 24 27 75 39**

## Keyp og søla av skipum



• Skipamekling
• Skipaumboðan
• Skiparakstur

Meira fæst at vita á:
**Tlf. 318531 • Fax 319369**

TOR SHIPPING
Niels Finsensgøta 23 · Box 1252 · 110 Tórshavn
e-mail: torship@post.olivant.fo www.torship.com

## Viðgerðarstovan



**Erna S. Hákonardóttir**
Alkohol- og Familjuráðgevi

Faklig ráðgeving • »Opin viðgerð« Einstaklingar • bólkar • skeið.

Ringið og fái nærri at vita.
**Tlf. 31 55 45**

ADC-Heilsølan
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

ARBEIÐSHANDSKAR
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

ADC

BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

## Lastbilur til sølu

Volvo F10 lastvognur við retardara árg. 84 og Palfinger 19 tm krana við radiostýring og spæli, árg. 96 til sølu um hóskandi boð fæst.

**Pf. Heri Thomsen**
Tlf. 441900
E-mail: transport@transport.fo